TB-HB 3-14 (1-6)

# Munurin millum deildirnar økist

**Tað var staðfest, at TB er so nógv tað veikasta liðið í bólkinum, tá HB vitjaði á Sevmýru um vikuskiftið**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Ikki kann sigast annað enn, at HB leikararnir fingu eina sera bleyta byrjan upp á kappingarárið, tá teir í fyrsta veruliga dystinum skuldu royna seg móti TB.

Munurin millum tær báðar bestu deildirnar er vorðin alt meira sjónligur seinnu árini, og við stórsigrinum hjá HB varð hann staðfestur við sjey-tumma seymi.

### Teir ungu gera um seg

Sum skilst á leikarunum hjá HB, so var talan um ein dyst, sum fult út samsvarar við úrslitið. Tað vil siga at HB fyri tað mesta sat á øllum, men tá so allir á liðnum vildu sleppa fram at í málveitsluni, gjørdist eitt sindur rúmligari hjá heimaliðnum, sum sostatt fekk pyntað nakað um úrslitið.

Annars mundi tað vera hugaligt hjá HB viðhaldsfólkunum, at Rókur F. Jespersen eisini kom á málskjúttaralistan í hesum dystinum. Hann hevur er júst fyltur 16 ár, og hevur sostatt loyvi at spæla vaksnamannafótbólt, og eftir úrslitunum í venjingardystunum at døma, er so avgjørt talan um ein áleypara, sum fer at geva teimum reyð/svørtu viðhaldsfólkunum nógvar góðar løtur komandi árini. Líkt er sostatt til, at tann aldan av ungum leikarum, sum í fjør setti sín dám á HB liðið bara tykist at halda fram.

Tað varð beinan vegin mett, tá luturin um bólkarnar varð kastaður, at tað fóru at verða HB, B36 og GÍ sum skuldu kappast um atgongumerkini, og einki í dystinum á Sevmýru tykist at broyta nakað upp á hesa meting.

### Dysturin í tølum

0-1: Bárður Mortansson 2.
0-2: Bárður Mortansson 12.
0-3: Jón Rí Jacobsen 14.
1-3: Eystein Jacobsen 15.
1-4: Hallur Danielsen 22.
1-5: Rógvi Jacobsen 29.
1-6: Jón Rói Jacobsen 42.
1-7: Bárður Mortansson 52.
1-8: Rógvi Jacobsen 54.
1-9: Rúni Nolsøe 64.
1-10: Rókur Jespersen 70.
1-11: Vagnur Mortensen 73.
1-12: Rókur Jespersen 74.
2-12: Kai Roest 78.
2-13: Rógvi Jacobsen 83.
3-13: Dan Mortensen 83.
3-14: Bárður Mortansson 90.

*Dómari:*
Birgir Sondum




*Tað var ikki ofta, at TB var fyrri á bóltinum, men hesa ferð eydnaðist so myndamanninum at fanga eina slíka støðu*

*Mynd: SjH*

VB-FS Vágar 5-1 (0-1)

# Krzysztof vendi dystinum



*Ikki fyrrenn venjarin kom á vøllin fingu vágbingar nakað at fegnast um*

**Spælandi venjarin hjá VB kom á vøllin seinasta hálva tíma og skoraði trý mál**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Eyðun Klakstein*

Føroyameistararnir úr VB vunnu stóran sigur á FS Vágum, sunnudagin, men tá hálvur tími var eftir at spæla, vóru vágamenn á odda 1-0.

Smáskaddi Krzysztof Popczynski setti seg sjálvan á vøllin, og so fekk VB hol á beinanvegin.

Krzysztof javnaði til 1-1, og løtu seinni legði VB seg fram um við brotssparki, sum Krzysztof eisini tók sær av.

Robert Cieslewicz skoraði síðani til 3-1, áðrenn Krzysztof enn einaferð var á rætta staðnum og gjørdi tað til 4-1. Palli Augustinussen skoraði seinasta málið í dystinum til endaliga úrslitið 5-1 til VB.

### Nýggjar útlendingar

FS Vágar løgdu seg á odda í fyrra hálvleiki, tá nýggi útlendski spælarin hjá teimum, Vlad, teir rópa, sendi eitt fríspark beinleiðis í málið.

Vágamenn høvdu tríggjar nýggjar útlendskarar spælarar á liðnum, og teir eru ættaðir út Letlandi og Litava.

VB hevði sum dysturin leið greiða yvirvág í spælinum, og teir spældu til tíðir væl. Tað gekk tó strilti hjá teimum at fáa nakað mál, og ikki fyrr enn spælandi venjarin kom á vøllin, koma glið á við málskjótingina.

### Dysturin í tølum

0-1: Vlad
1-1: Krzysztof Popczynski
2-1: Krzysztof Popczynski, br.
3-1: Robert Cieslwicz
4-1: Krzysztof Popczynski
5-1: Palli Augustinussen

EB/Streymur-NSÍ 0-2 (0-1)

# Runavíkingar onga lætta uppgávu

**Ungu spælararnir hjá EB/Streymi stríddust óføra væl, men NSÍ vann dystin 2-0**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin var NSÍ á vijan á Mølini á Eiði. Dysturin ímóti nýggja liðnum í 1. deild, EB/Streymi, gjørdist júst so trupul, sum runavíkingar høvdu roknað við frammanundan.

Ungu spælararnir á liðnum hjá EB/Streymi eru ídnir, stríðast væl og spæla stundum góðan fótbólt.

NSÍ kom á odda eftir eitt lítið korter, tá Christian Høgni Jacobsen legði ein bólt inn fyri úr síðuni. Eddie Mikkelsen var klárur inni við málið, og hann sendi bóltin høgt í málið.

Hálvleiksstøðan var 1-0, og fyrri hálvleikur hevði verið javnur í spælbýti.

### Heimaliðið trýsti

NSÍ byrjaði væl í seinna hálvleiki, og teir øktu eisini til 2-0 miðskeiðis í seinna hálvleiki.

Hetta málið líktist tí fyrra málinum, men hesaferð var tan Ian Højgaard, sum hevði seinasta fótin á.

Eftir at NSÍ hevði lagt seg fram um 2-0, tók EB/Streymur yvir.

Teir trýstu fyri at fáa eitt mál, men tað eydnaðist teimum ongantíð, hóast teir høvdu tveir stórar kjansir, og eisini spældu seg til fleiri hornaspørk seinasta partin av dystinum.

Dysturin endaði sostatt við sigri til runavíkingar, sum harvið fingu góða byrjan í bólkaspælinum í steypakappingini.

### Dysturin í tølum:

0-1: Eddie Mikkelsen
0-2: Ian Højgaard



*EB/Streymur tapti 2-0 í fyrsta heimadystinum á árinum*



B36–GÍ 2–2 (1–2)

# Sovandi byrjan



*Mong hildu at Bartal Eliasen skuldi verið skrásettur fyri seinna málið hjá GÍ*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað sást týðiliga, at talan var um fyrsta veruliga dystin á árinum, tá B36 og GÍ hittust í Gundadali leygardagin**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Heilt fitt av fólki høvdu leitað sær oman í Gundadal, tá GÍ kom á vitjan hjá B36 í fyrsta veruliga dystinum hjá feløgunum hetta kappingarárið.

Ivaleyst gjørdi stillføra veðrið sítt til, at somikið nógv høvdu leitað sær oman, men ikki minst mundi tað fyri heimaáskoðararnar telja við, at nú fingu tey høvi til at síggja stjørnusetta B36 liðið, sum mong rokna við fer at spæla við í oddinum í ár.

### Skeivur hugburður

Lat tað bara verða sagt beinan vegin. Tað er væl hugsandi, at B36 fer at hava ein leiklut í oddinum í ár, men skulu teir tað, skal hugburðurin hjá leikarunum vera ein heilt annar, enn hann var leygardagin.

Spælið gekk sera seint fyri seg stóran part av tíðini. Ikki bert hjá heimaliðnum, tí hjá gestunum gekk tað heldur við tí tí øgiligu ferðini. Teir tóktust tó nakað betri skipaðir í útgangsstøðnum, men tað var tó heimaliðið, sum kom á odda, tá knappur hálvur tími var farin, og tað var vorið sum mál. Hans Pauli Petersen tveitti seg fram um Jákup á Borg, tá ein bóltur varð sendir innfyri, og hann gjørdi ikki mætari enn at stútað bóltin upp í málhornið.

Við tveimum tøttum málum eydnaðist tó GÍ at venda dystinum fyri steðgin. Fyrst kunbdi Óli Hansen gera sær dælt av eini misskiljin millum Rene Torgarð og Andrzej Pacek, og síðani var B36 leikari óheppin at beina bóltin í egið mál. Fleiri hildu, at Bartal Eliasen átti seinasta fótin á, men dómarain skrásetti hendingina sum sjálvmál.

### Deydligt

Í seinna hálvleiki hendi millum lítið og einki størsta partin av tíðini. Heimaliðið megnaði ikki at koma fram við væl skipaðu gestunum, og GÍ tóktist hinvegin ikki so ógvuliga áhugað í at skapa nakað. Teir høvdu eina leiðslu, og hesa hildu teir eisini fast um í 35 minuttir.

Tá eydnaðist tað júst innskifta Bjarna Prior at sneiða fram við málverjanum, og trilla bóltin móti málinum, har Jákup á Borg gav kúluni seinasta skumpið. GÍ leikarar vóru ónøgdir, tí teir mettu talan vera um rangstøðu, men málið stóð í øllum førum við. Nakað seinni vildu GÍ hava brotsspark, men dómarin tóktist ikki ansa armin hjá Bjarna, og so kundu liðini býta stigini ímillum sín. Kanska ikki heilt óhóskandi, tí hvørgin parturin vísti nakað serligt hendan dagin, og fyri áskoðararnar hjá báðum er at vóna, at liðini bæði fara at spenna seg væl meira, tá bólkaspælið í steypakappingini er av, og dystirnir av álvara gerast týdningarmiklir.

### Dysturin í tølum:

1-0: Sjálvmál 27.
1-1: Óli Hansen 33.
1-2: Sjálvmál 40.
2-2: Jákup á Borg 80.

Dómari: Oddmar Andreassen

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

### Bólkur 1

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 | KÍ | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 | B71 | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 | ÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |

### Bólkur 2

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 1 | 1 - 0 - 0 | 14 | 3 | 11 | 3 |
| 2 | B36 | 1 | 0 - 1 - 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 3 | GÍ | 1 | 0 - 1 - 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 4 | TB | 1 | 0 - 0 - 1 | 3 | 14 | -11 | 0 |

### Bólkur 3

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 1 | 1 - 0 - 0 | 5 | 1 | 4 | 3 |
| 2 | NSÍ | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 | EB/Streymur | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| 4 | FS Vágar | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 5 | -4 | 0 |

# Tveir 10'arar

**Bæði John Petersen og Sámal Joensen hava fingið álitisstørv, nú teir eru komnir aftur úr Íslandi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur leingi ligið í luftini, at hvørgin av landsliðsleikarunum, John Petersen og Sámal Joensen, skuldu fara aftur til Íslands, har teir í fjør vóru við á liðnum hjá Leiftri.

Tíðindini eru ongan tíð blivin váttaði, men leygardagin var so sjón fyri søgn, at teir nú eru aftur at finna í teimum feløgum, haðani teir fóru til Íslands.

### Álitisstørv

Tað tykist eisini greitt, at í báðum feløgum er gleðin um at hava leikararnar aftur sjónlig. Báðir høvdu teir nevnliga 10-talið á rygginum, og báðir vóru teir eisini liðformenn, tá teir í fyrsta veruliga dystinum á árinum skuldu royna seg.

Tað er nú heldur einki at ivast í, at tað fyri bæði liðini er ein veruligur styrkur at hava leiakararnar á liðnum. GÍ hevði eitt hitt vánaligasta kappingarár í fyrstu deild í fjør, men fekk tó bjargað sær løgmanssteypið, sum teir nú eru í ferð við at verja. Hjá B36 gekk hóast alt nakað betri, men stórur partur av stigunum hjá teimum varð fingin til vegja, áðrenn John Petersen eftir fimta umfar takkaði fyri seg.



*Bæði John Petersen og Sámal Joensen eru nú aftur í ávíkavist B36 og GÍ*

*Mynd: Álvur Haraldsen*